


## FUNDIR, TILTØK O.A. Í APRÍL:

**7. apríl** móttøka fyri nýggja farmaskipinum hjá Smyrilline (Mykines) í Þorlákshöfn.

**10. apríl** vitjan av Danny & the Veetos.

**20. apríl** vígsla av nýbygging Stovnur Vigdísar Finnbogadóttur saman við Rigmor Dam, lstkv.

**24. apríl** fundur við forseta Íslands, Guðni Th. Jóhannesson, saman við løgmanni.

**25. apríl** fundur við Bjarna Benediktsson, forsætisráðharra, saman við løgmanni.

**25. apríl** flaggdagshald hjá Sendistovuni. Løgmaður heldur flagg-dagsrøðuna.

## 5 ÁRA FÍGGJARPOLITISKA ÆTLANIN 2018 – 2022

Íslendska stjórnin hevur seinast í mars lagt 5 ára ætlanina fram, sum er grundað á raðfestingarnar hjá stjórnini. Tey økini, sum hækka mest, eru: Heilsurøkt og sosial vælferð. Ætlanin er, at realhækkingin í tíðarskeiðinum fer at verða 22% fyri heilsurøkt og 13% fyri sosiala vælferð.

Innan heilsurøkt verður m.a. nýtt Landspítal bygt, bíðilistarnir styttir, nýggj brúkaragjaldsskipan verður sett í verk og kostnaðurin hjá sjúklinginum verður lækkaður.

Á økinum innan sosiala vælferð, vil gjaldið í sambandi við barnsburðarfarloyvi hækka, skattafría inntøkumarkið av lønarinntøkum hjá fólkapensjonistum skal hækkast í stigum. Skipanin viðv. avlamisveitingar verður endurskoðað, útreiðslurnar hækka og hjálp til at søkja starv verður styrkt. Skipað stig verða tikin til at loysa bústaðar trupulleikarnar. Arbeitt verður fyri, at vinna á barna fátækradømi.

Á skattaøkinum er tað serliga meirvirðisgjaldið, sum verður broytt soleiðis:

- Hægra mvg stigið verður lækkað frá 24,0% til 22,5%. Hetta kemur í gildi í januar 2019.
- Flestu økini innan ferðavinnu verða flokkaði í hægra mvg stiginum, t.v.s. 24% frá 1. juli 2018 at rokna. Matstovuvirksemi heldur tó fram í tí lægra mvg stiginum – 11% - eins og matur, ið er flokkaður í hesum mvg-flokki.

> *» Higartil hevur ferðavinnan rindað 11% í mvg og hon er alt annað enn fegin um, at mvg´ið meira enn tvífaldast. Roknað verður við, at henda broyting kemur at geva uml. 16 mia. ISK (~ 1 mia. DKK) um árið í Ríkiskassan. «*

Ferðavinnan vísir á, at hetta kann skaða ferðavinnuna, men politikararnir vísa hinvegin á, at tá ið mvg´ið var hækkað frá 0% til 11% vísti tað seg ikki at ávirka ferðavinnuna. Í 2016 komu 1,8 mió. ferðafólk og í 2017 verður roknað við, at ferðafólkatalið kemur uppá 2,3 mió.

Roknað verður við, at lækkingin í tí hægra mvg´num kemur at hava við sær, at brúkaraprísindeksið kemur at lække við 0,4%.




*Mynd 1. Yvirlit yvir skuld hjá Ríkiskassanum og kommununum.*
Heimild: Ísl. Fíggjarmálaráðið

Reallønarvøksturin vaks við 9,5% í 2016, sum er tann hægsta hækkingin í eitt einstakt ár, síðan hesar mátingar byrjaðu. Talið av fólki í arbeiði er høgt í søguligum sambandi, og arbeiðsluttøkan millum kvinnur hevur ongantíð verið hægri. Langtíðar arbeiðsloysið er eisini lágt.

Almenna skuldin minkar skjótt. Søla av ognum, útbýti og stórt avlop av almenna rakstrinum fer at hava við sær eina skjóta niðurgjalding av skuldini. Samstundis hækkar BTÚ nógv og fer skuldin í mun til BTÚ eisini at minka av hesum ávum. Sum tað sæst á myndini til vinstru, so hækkaði skuldin hjá Ríkiskassanum nógv í kreppuárunum, men seinastu árini er hon lækkað munandi. Longu í 2019 er skuldin komin undir 30% av BTÚ. Í 2027 hevur stjórnin sett sær fyri, at skuldin hjá Ríkiskassanum er burtur.

*Sí meira her (á enskum)*

## ÚTLENDSKIR ÍLEGGJARAR KEYPA 30 % AV ARION BANKA




*Mynd 2. Høvuðssæti hjá Arion banka í Reykjavík.*

Goldman Sachs og trý íløgufeløg hava keypt 30% av partabrøvunum í íslendska Arion banka. Áðrenn fíggjarkreppuna í 2008, høvdu útlendsk íløgufeløg ikki álit á íslendska búskapinum, men hetta er nú broytt og er tað sera positivt, sigur Benedikt Jóhannesson, fíggjarmálaráðharri.

Nú kapital bindingarnar eru tiknar av, velja íleggjarar aftur at gera íløgur í Íslandi. Hetta vísir, at umheimurin hevur álit á Íslandi og Arion banka sum ein íløga.

Sí meira her (á enskum)

## ÍSLENDSKU FIRÐIRNIR KUNDU FRAMLEITT 200.000 TONS




*Mynd 3. Kort yvir alistøðini. Serliga er tað í Vestfirðum og eystanfyri, at aling á sjónum verður loyvd.*

Havrannsóknarstovnurin hevur mett, at teir 7 firðirnir og flógvarnir tola at framleiða í heildina 125 túsund tons. Hetta er tríggjar til fýra ferðir so nógv, sum alifyritøkurnar hava loyvi til at ala á sjónum í hesum firðum í dag. Hinvegin hava tær ætlanir um at vaksa talið í framtíðini. Nakrir firðir eru eftir at meta um, soleiðis at tey øki, ið eru opin fyri fiskaaling, kunnu økja teirra mongd, av tí at firðirnir tola tað.
Fimm tær størstu sjóalifyritøkurnar í Íslandi hava søkt um at økja núverandi loyvi, soleiðis at heildarframleiðslan verður 185 túsund tons. Tað er í firðum, sum hava fingið metingina og í firðum, ið ikki eru mettir enn. Tað er ikki vist, at kanningin avmarkar ætlanirnar. Tá allir firðir, ið eru í økinum, hava verið kannaðir, kann kanningin eftirmetast. Samanborið verður við teir firðirnar, ið eru blivnir kannaðir. Sum víst á kortinum, er sjóaling ikki loyvd í Vesturlandinum, meginpartinum av Norðurlandinum og norðanfyri á Eysturlandinum. Hetta forboðið varð sett í verk fyri meira enn 10 árum síðan, fyri at verja villlaksastovnin í laksaáunum.
Av hesi orsøk, hevur laksaalingin fyri tað mesta verið á Eystfirðunum og Vestfirðunum. Ætlanin er eisini at ala í Eyjafirði. Sjálvt á teimum økum, har loyvt er at ala laks, skulu ávísar treytir lúkast. Endaligt loyvi fæst ikki fyrr enn havrannsóknarstovnurin hevur roknað út, hvat hvør fjørður tolir.
Hinvegin, so verður tað ikki lætt at økja munandi um alingina á sjónum, tí laksafisking í teimum uml. 130 áunum, sum laksur verður fiskaður í, hevur stóran týdning fyri bøndur o.o., sum eiga áirnar. Tey, sum standa fyri laksafiskingini í áunum, stúra fyri, at bland skal koma í millum villlaksin og alda laksin, eins og aldi laksurin skal smitta villlaksin við sjúku. Villlaksaveiðan í áunum hevur stóran búskaparligan týdning. Roknað verður við, at inntøkurnar (beinleiðis og

óbeinleiðis) av villlaksafisking í áunum er millum 15 – 20 mia. ISK (1 – 1,25 mia. DKK) um árið. Roknast kann við stórari mótstøðu frá teimum, sum standa fyri villlaksaveiðuni í áunum.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## DÝRT AT VERA FERÐAFÓLK Í ÍSLANDI



*Mynd 4. Arion Banki hevur gjørt eina frágreiðing, sum lýsir ferðavinnuna og avbjóðing hennara í 2017. Leinkja er niðast í greinini til hesa frágreiðing.*

Tað var 10 – 32% dýrari at gista í hotellum í Reykjavík enn í øðrum høvuðsstøðum í Norðurlondum í 2016. Innivist/hýsing og matstovuprísir vóru 44% hægri enn miðal prísurin í ES í 2015. Ferðaprísir vóru 52% dýrari, og rúsdrekka prísirnir vóru 126% dýrari enn miðal prísurin í ES. Sambært Arion Research, er Ísland eitt av heimsins dýrastu londum. Sjálvt um tað er dýrt at vera ferðafólk í Íslandi, heldur hetta ikki ferðafólkum aftur, og ferðafólkatalið er mett at hækka aftur í ár. Tað vantar íbúðir í Íslandi, gistingarmøguleikar, arbeiðsmegi o.a.
Vit eru við at nærkast markinum á ávísum økjum. Um stjórnin ætlar at gera nakað við hetta, er tíðin við at vera úti. Konráð S. Guðjónsson, búskaparfrøðingur í greiningardeildini hjá Arion banka, mælir til, at tað kemur eitt avgjald á flogferðaseðlarnar til og frá Íslandi. Hetta avgjaldið kann nýtast til at tryggja viðlíkahald av vegum o.a.
Styrkta krónan ávirkar løn og vøruprísir. Konráð S. Guðjónsson heldur, at sambært mátistokkinum er Ísland vorðið, ella er við at verða dýrasta land í heiminum.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## FLEIRI FLÓTTAFÓLK TIL ÍSLANDS




*Mynd 5. Yvirlit yvir flóttafólk, mánaðir og ár.*

Arndís A.K. Gunnarsdóttir, løgfrøðingur hjá Reyða Krossi sigur, at umstøðurnar í Irak versna og versna, og tí kann roknast við, at alt fleiri flóttafólk søkja friðskjól í Íslandi. Hon vísir á, at av 71 umsóknum um friðskjól í februar 2017, vóru 9 fólk úr Irak. Tað vóru flest albanar ið søktu friðskjól, teir vóru 18 í tali. Nógvir av hesum irakum eru kurdar, og koma higar við vón um nýggjar møguleikar, eftir at hava fingið noktað friðskjól aðrastaðni í norðurlondunum.

Í fyrstu 10 vikunum av árinum í ár, søktu tilsamans 128 fólk um friðskjól í Íslandi. Hendan stóra mongdin av umsóknum vísir, at mongdin av umsóknum í ár verður størri enn tann í fjør. Tá komu tilsamans 1.132 flóttafólk til Íslands.

Sí meira her (á íslendskum)

## COSTCO OPNAR VØRUHANDIL Í REYKJAVÍK




*Mynd 6. Fyrsta Costco vøruhúsið í Íslandi opnar 23. mai í Reykjavík*

Í mai mánaði opnar Costco, ið er ein stór amerikansk fyritøka, sín fyrsta handil í Íslandi. Hóast vøruhandilin ikki er opnaður enn, hevur hann verið nógv umtalaður og kann ávirka prísin á m.a. matvøru.
Costco hevur 725 vøruhandlar kring heimin. Tað er bara ein útlendsk handilsketa við matvørum í Íslandi, sum nú er, og tað eru nærum einans íslendskar vørur á marknaðinum. Meginparturin av matvøruhandlunum í Íslandi hava sama veitara, og tískil somu vøru. Fleiri íslendskir innflytarar hava valt at endurskoða sáttmálarnar viðv. mati og drykkjuvørum við sínar veitarar, fyri at betra um kappingarførið, tá Costco opnar í mai. Umframt at selja matvørur, selur Costco eisini olju, apoteksvørur og bøkur. Costco hevur eisini síni egnu vørumerki og fer tískil at skilja seg burtur frá restini av handlunum í Íslandi. Um íslendska stjórnin fer at loyva matvøruhandlum at selja vín, øl og sterkari løg, fer Costco eisini at selja tað. Íslendingar eru sera ónøgdir við oljuprísirnar í Íslandi og vóna, at hetta fer at

trýsta oljuprísin niður. Hetta er fyrstu ferð, Costco fer inn á ein marknað, sum er á støðd við Ísland. Um vøruhandilin í Reykjavík fer at gangast væl, er sannlíkt at Costco fer at opna handlar í londum sum Danmark, Svøríki og Norra.
Tað, at Costco opnar í mai mánaði, hevur longu sett síni spor. Bensinstøðirnar eru byrjaðar at lækka bensin- og oljuprísirnar og ein stór fyritøka, sum selur bildekk, hevur lækkað prísin við 40%, fyri at taka kappingina upp við nýggja risan.

*Sí meira her (á enskum)*

## B2B RÁÐSTEVNA Í ÍSLANDI 22. – 24. MARS



*Mynd 7. Frá B2B ráðstevnu á Hotell Hilton í Reykjavík 22. mars.*

Fyri fyrstu ferð síðan Hoyvíkssáttmálin kom í gildi, hevur B2B ráðstevna verið hildin í Íslandi. Tvær ferðir áður hava slíkar ráðstevnur verið í Føroyum. Við Poul Michelsen, landsstýrismanni á odda, luttóku 18 føroyskar fyritøkur. Føroysku fyritøkurnar høvdu ynskt at hitta íslendskar fyritøkur o.o. innan teirra øki. Sigast má at fleiri fyritøkur fingu væl burturúr og fleiri fingu knýtt góð sambond, sum byggjast kann víðari upp á.
Vitjað varð eisini í Sendistovuni, har sendimaðurin greiddi frá íslendskum viðurskiftum og hvat fyri tænastur, Sendistovan kann bjóða føroyskum fyritøkum. Vitjað varð eisini hjá Matís og hjá íslenska Sjávarklasinn (The Iceland Ocean Cluster).
Sum heild ein væl eydnað vinnuráðstevna, sum óivað kemur at økja um samhandilin millum Føroyar og Ísland.

## SENDIMAÐURIN VITJAR Á SUÐUR- OG EYSTURLANDINUM



*Mynd 8. Sendimaðurin á vitjan hjá Set í Selfossi saman við Örn Einarsson, ið er ein av eigarunum.*

Í mars mánaði vitjaði sendimaðurin borgarstjórar og fyritøkur á Suðurlandinum á veg til Føroyar í sambandi við sendifólkadagin heima í Føroyum. M.a. varð borgarstjórin í Þorlákshöfn vitjaður, har sum nýggja farmaskipið hjá Smyrilline (Mykines) kemur at sigla til. Somuleiðis varð havnastjórin vitjaður. Í Þorlákshöfn rokna tey við, at nýggja flutningssambandið kemur at hava stóra ávirkan á kommununa. Tey hava longu merkt stóran áhuga í hesum frá fleiri síðum. Somuleiðis varð borgarstjórin í Selfossi vitjaður, eins og fleiri fyritøkur í kommununi, m.a. stóra mjólkarvirki MS (Mjólkursamsalan ehf) og stóra rørverksmiðjan Set ehf. Í Eskifirði varð pelagiska virkið hjá Eskja hf. vitjað, eins og stjórin í Fiskimið ehf., Jens Garðar Helgason, sum eisini er formaður í Reiðara- og virkiseigarafelagnum í Íslandi.
Sendimaðurin varð væl móttikin og allastaðni, har vitjað varð, bleiv nógv tosað um at styrkja samhandilin og sambandið við Føroyar.
Í Føroyum vóru m.a. stjórarnir í hesum fyritøkum og stovnum vitjaðar: Vónin, NH Frakt & Sand, Navia, sum allar hava góð handilssambond við Ísland og sum í flestu førum eru í menning. Tórshavnar kommuna, fund við partar av nevndini í FO-IS (føroyska-íslendska handilskamarið), Kringvarp Føroya, BankNordik og VRG (Virkisráðgeving).
Føroyskar fyritøkur hava vaksandi áhuga í íslendska marknaðinum, nú búskapurin veksur so skjótt í Íslandi, eins og íslendska krónan er styrkt so nógv í virði í seinastuni, at føroyskar fyritøkur gerast meira kappingarførar á íslendska marknaðinum.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook